## Eingin Berbatov í HM-dystum

Bulgarski álopsspælarin, Dimitar Berbatov, hevur fingið ein skaða, og tað gongur millum annað út yvir bulgarska landsliðið, sum skal spæla tveir HM-undankappingardystir í næstum. Bulgaria skal spæla ímóti Írlandi og Kypros, men tað verður uttan stóru álopsstjørnuna, sum skal binda frið í minst tvær vikur. Í Mancester United vóna tey, at Berbatov verður tøkur aftur til Champions League-dyst tann 7. apríl.



## Wenger fyri lívstíð

Hóast Arsenal ikki hevur vunnið nakra stóra kapping síðani 2005, hevur leiðslan í Arsenal stórt álit á venjaranum, Arsene Wenger. Stjórin í London-felagnum, Ivan Gazidis, sigur við blaðið The People, at Arsene Wenger kann halda fram í Arsenal, so leingi hann hevur hug til tað. – Vit hava eitt sera spennandi lið við ungum spælarum á veg, og eg rokni við, at Wenger ætlar sær at gera tað arbeiðið liðugt, sigur Gazidis.

# Gylta vikuskiftið hjá Liverpool

**Meðan Manchester United og Chelsea fullu, helt Liverpool enn eina ferð málveitslu.**

PREMIER LEAGUE

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*



*Steven Gerrard skoraði tríggjar ferðir á Anfield, harav tvær ferðir upp viðbrotssparki. Her fegnast hann saman við Albert Riera, sum eitt av brotsspørkunum var gjørt ímóti*

*Mynd: Paul Thomas/AP*

Liverpool eru øgiligir fyri tíðina. 4-0 á Real Madrid, 4-1 á Manchester United og nú 5-0 á Aston Villa. 13-1 í trimum dystum eftir 11 døgum!

Og farna vikuskiftið lagaði seg einastandandi væl hjá teimum reyðu úr Liverpool. Chelsea og Manchester United snávaðu, og tað gagnnýtti Liverpool 100 prosent. Á stigatalvuni eru teir bara eitt stig aftan fyri Manchester United, sum má fegnast um, at komandi vikuskiftið fer til HM-undankappingardystir.

### Gerrard stóra hetjan

Steven Gerrard gjørdist stóra hetjan hjá Liverpool við trimum málum, harav tveimum upp á brotsspark.

Dirk Kuyt byrjaði málveitsluna hjá Liverpool, tá Xavi Alonso stútaði á yvirleggjaran. Kuyt var sum ein køttur á bóltinum og drønaði hann í kassan til 1-0.

Tá vóru bara átta minuttir farnir av dystinum. Løtuna aftaná hevði Aston Villa sínar tveir størstu málmøguleikar, men Pepe Reina bjargaði væl.

Men tá var vitjanartíðin hjá Aston Villa farin, og tá 33 minuttir vóru farnir sendi Reina Albert Riera avstað við einum longum útsparki. Reira hálvfluktaði bóltin í netið við brotsteigarmarkið, umvegis yvirliggjaran og inn.

Seks minuttir seinni var dysturin mestsum avgjørdur, tá Aston Villa-verjuspælarin, Nigel Reo-Coker, feldi Riera. Gerrard setti bóltin trygt í netið.

### Friedel sá reytt

Brad Friedel hevur mangan staðið seg væl sum málmaður hjá Liverpool, Blackburn og Aston Villa, men í seinna hálvleiki var hann rættiliga óheppin. Fyrst læt hann eitt ikki ov hart fríspark hjá Steven Gerrard fara í málið til 4-0, og stutt eftir gjørdi hann brotsspark ímóti Fernando Torres, og var sendur av vøllinum.

Brotssparkið gagnnýtti Steven Gerrard til at fáa eitt reint hattrick. – At skora eitt hat-trick hevur stóran týdning fyri meg, men stigini eru týdningarmiklari. Vit vunnu við størri tølum, enn eg hevði væntað, segði Steven Gerrard eftir dystin.

– Undan dystinum hevði eg verið nøgdur við ein 1-0 sigur. Men Villa hevur ikki verið í góðum formi síðstu tíðina, og tí var tað týdningarmikið ikki at geva teimum frið.

Gerrard hevur eisini vunnið ein stórsigur uttan fyri vøllin, nú løgreglan á Merseyside hevur valt ikki at ákært hann í einum harðskapsmáli, sum hevur fingið stóra umrøðu í ensku miðlunum. Gerrard kann nú seta fult fokus á Premier League- og Champions League-kappingarnar.

### Oddaliðini fullu

Manchester United var á Craven Cottage í Fulham, har Paul Scholes duldi sera væl, at hann hevur 15 ára royndir í Premier League, tá hann tók bóltin við hondini á málstrikuni. Hetta kostaði honum reyða kortið og Fulham fekk brotsspark. Danny Murphy hevur tað sum fastan sið at skora ímóti Manchester United, og hann setti brotssparkið í netið til 1-0.

United hevði onkrar stórar møguleikar til javna, men inn fór bólturin ikki. Í seinna hálvleiki fekk Wayne Rooney eina margháttliga útvísing fyri at flyta bóltin.

Níggju ímóti 11 var einki at gera, og Zoltan Gera kundi tí staðfesti sigurin fyri Fulham stutt undan leikloki.

Chelsea var fyrsta liðið, sum skuldi gagnnýta, at United snávaði, men tað eydnaðist ikki. Dysturin millum Tottenham og Chelsea var annars útsettur ein hálvan tíma, orsakað av einari bumbuhóttan, men tíbetur var einki áfatt.

Tottenham vann ein kærkomnan sigur yvir lokalu arvafíggindunum í Norður-London, og hava Spurs nú arbeitt seg burtur úr botninum. Kroatiski spælarin, Modric, skoraði sigursmálið, tá fimm minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki.

Arsenal er av álvara komið í gongd eftir fleiri málleysar javnleikir á heimavølli. Hesa ferð vann Arsenal 3-1 í Newcastle, og nú Aston Villa er mestsum uppsteðgað, eru øll tekin í sól og mána um, at Arsenal eisini fer at spæla Champions League-fótbólt komandi kappingarár.

**Premier League**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Man Utd | 29 | 20 | - | 5 | - | 4 | 49 | 18 | 31 | 65 |
| 2 | Liverpool | 30 | 18 | - | 10 | - | 2 | 54 | 21 | 33 | 64 |
| 3 | Chelsea | 30 | 18 | - | 7 | - | 5 | 49 | 17 | 32 | 61 |
| 4 | Arsenal | 30 | 15 | - | 10 | - | 5 | 48 | 27 | 21 | 55 |
| 5 | Aston Villa | 30 | 15 | - | 7 | - | 8 | 43 | 36 | 7 | 52 |
| 6 | Everton | 30 | 13 | - | 9 | - | 8 | 40 | 31 | 9 | 48 |
| 7 | Wigan | 30 | 11 | - | 8 | - | 11 | 30 | 28 | 2 | 41 |
| 8 | West Ham | 30 | 11 | - | 8 | - | 11 | 35 | 35 | 0 | 41 |
| 9 | Fulham | 30 | 10 | - | 10 | - | 10 | 30 | 26 | 4 | 40 |
| 10 | Man City | 30 | 11 | - | 5 | - | 14 | 46 | 37 | 9 | 38 |
| 11 | Tottenham | 30 | 10 | - | 8 | - | 12 | 36 | 34 | 2 | 38 |
| 12 | Bolton | 30 | 10 | - | 4 | - | 16 | 32 | 44 | -12 | 34 |
| 13 | Hull | 30 | 8 | - | 9 | - | 13 | 35 | 52 | -17 | 33 |
| 14 | Sunderland | 30 | 8 | - | 8 | - | 14 | 29 | 39 | -10 | 32 |
| 15 | Portsmouth | 29 | 8 | - | 8 | - | 13 | 32 | 46 | -14 | 32 |
| 16 | Stoke | 30 | 8 | - | 8 | - | 14 | 29 | 47 | -18 | 32 |
| 17 | Blackburn | 30 | 7 | - | 10 | - | 13 | 33 | 49 | -16 | 31 |
| 18 | Newcastle | 30 | 6 | - | 11 | - | 13 | 36 | 49 | -13 | 29 |
| 19 | Middlesbr. | 30 | 6 | - | 9 | - | 15 | 21 | 42 | -21 | 27 |
| 20 | WBA | 30 | 6 | - | 6 | - | 18 | 26 | 55 | -29 | 24 |

## Barcelona við dreymafótbólti

**Umframt at geva Malaga eitt tennisegg, so gav Barca eisini mótstøðuliðnum eina sanna fótbóltsfrálæru.**

PRIMERA LIGA

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Í gjár vóru Barcelonaspælarnir sonn yvirmenniskju á Nou Camp-leikvøllinum í Barcelona. Teir bankaðu ikki bara Malaga 6-0 á máltalvuni, men leikliga og listarliga vísti teir eitt slag av fótbólti, sum var ófatuliga hugtakandi og vakurt.

Xavi byrjaði málveitsluna, tá 18 minuttir vóru spældir, og seks minuttir seinni gjørdi Lionel Messi ein sannan »Diego Maradona«. Argentinski bóltsnillingurin fekk bóltin uttan fyri brotsteigin og fintaði tveir verjuspælarar hjá Malaga undir grasteppið, áðrenn hann hegnisliga beindi bóltin í málið.

Síðani átti Thierry Henry tørn, tá hann fekk eina fullkomna sending frá Xavi, fintaði Malaga-málverjan, Goitia, og setti bóltin í netið til 3-0. Samuel Eto'o skoraði tvey mál, eitt í hvørjum hálvleiki, og Daniel Alves kom eisini á máltalvuna.

Framvegis rennur Real Madrid aftan á Barcelona, men er enn seks stig aftanfyri. Real helt eina minni málveitslu á heimavølli í Madrid við 3-0 sigri á Almeira. Klaas van Huntelaar ger veruliga vart við seg við tveimum málum, eftir at Marcelo hevði Real á odda við einum sera vøkrum máli.